# Eydna í Hoyvíkar kirkju



Kristina Hestbech, sóknarprestur í Havn, hevur í annaðkvøld fyrilestur í nýggju Hoyvíkar kirkjuni. Undir evninum "Det gode liv – jagten på lykke" fer kendi danski presturin at hugleiða. Kristina Hestbech er kend frá sjónvarpssendingum í Danmark, umframt at hon hevur verið við í í arbeiðnum hjá eini serligari arbeiðs- og familjunevnd hjá donsku stjórnini, og har hevur uppgávan verið at gera tilráðingar um, hvussu arbeiðsmarknaðurin og familjulívið fáast betur at passa saman. Fyrilesturin byrjar mikukvøldið kl. 19.30 í Hoyvíkar kirkjuni.

# Javnaðar-Café fríggjakvøldið

Fríggjakvøldið 11. januar skipar Javnaðarflokkurin fyri valCafé. Skráin umfatar røður, felagssang, tónleik og skemt. Jóannes Eidesgaard, Helena Dam á Neystabø, Heðin Mortensen, Katrin Dahl Jakobsen, John Johannessen og Kristian Magnussen fara at halda røður. Vilhelm Johannesen og Henrik Old fara at undirhalda við skemtiligum søgum úr tinginum og av Gamla Apoteki. Harumframt verður møguleiki fyri at hitta øll tey nýggju valevnini hjá Javnaðarflokkinum í Suðurstreymi. Tey eru Ann-Elisabeth Joensen, Hilmar Augustinussen, Óluva Niclasen, Ingrid Henriksen, Aksel Johannesen og Maria Hammer Olsen. ValCafé'in verður í hølunum hjá Javnaðarflokkinum á Áarvegum fríggjadagin kl. 20.

Atlantic Petroleum:

# Ársins Børsrakett 20



**Stór kanning vísir, at besta íløgan tað eina árið, kann gerast vánaligasta íløgan tað næsta árið. Tí ræður um at vera varin við íløgum í partabrøv og at vísa skynsemi**

ÍLØGUR
*Finnur Sivertsen, búskaparfrøðingur Business-line.fo*

Teir seinastu dagarnar fyri jól er vanliga rættiligur gravgangur á bankarnar av skattaborgarum, ið vilja fáa gleði av tí skattalætta, sum stendur teimum í boði, um teir rinda eftirlønina á konto í bankanum innan árslok.

Danir hava í 2007 goldið omanfyri 100 milliardir kr. í eftirløn. Hetta er peningur, ið fyri stóran part skal út á altjóðapartabrævamarknaðin at arbeiða.

**Bestu partabrøvini í 2007**

Við árslok er vanligt at kanna, hvørjar íløgur hava staðið seg best, tær sokallaðu børsrakettirnar. Her hevur føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum rættiliga gjørt vart við seg sum tann besta íløgan á danska Virðisbrævamarknaðinum í 2007 við eini úrtøku uppá 249% og 110% frammanfyri reiðaríið Norden, á 2. plássi. Til lukku við tí!

Sí talvu

Besta norska partabrævið í 2007 gjørdist farmaflutningsfelagið Golden Ocean, ið hevði eina úrtøku uppá 207%. Besta svenska partabrævið í fjør gjørdist veddingarfyritøkan Betsson, har ikki bert spælarar, men eisini íleggjarar tordu at vedda uppá at teir fingu góða úrtøku - og fingu 402%!

**Íløgufeløg**

Eitt íløgufelag er ein felagsskapur, har eitt tal av íleggjarum hava tikið seg saman um at fáa sum mest burturúr síni uppsparing við at gera íløgur í virðisbrøv við góðari úrtøku og minni tapsvanda, uttan at teir eru serfrøðingar.

Hyggja vit eftir úrslitum hjá donskum íløgufeløgum fyri 2007 sæst, at tað eru tey feløgini, ið hava gjørt íløgur í nýggjum marknaðum í Asia, Latínamerika og Eysturevropa, ið hava fingið tey bestu úrslitini, við eini úrtøku uppá 15-36% í 2007.

| Top-10 1996-1999 Staðseting | Árlig úrtøka | Somu 10 1999-2002 Staðseting | Árlig úrtøka |
|---|---|---|---|
| 1 | 66% | 841 | -37% |
| 2 | 63% | 832 | -31% |
| 3 | 60% | 845 | -41% |
| 4 | 59% | 791 | -27% |
| 5 | 55% | 801 | -29% |
| 6 | 53% | 798 | -28% |
| 7 | 52% | 790 | -27% |
| 8 | 52% | 843 | -39% |
| 9 | 50% | 851 | -52% |
| 10 | 50% | 793 | -28% |

*Kelda: Bogle Financial Centre, Lipper Inc.*

| Felag | Kurshækking 2007 |
|---|---|
| Atlantic Petroleum P/F | 249% |
| D/S Norden | 139% |
| Vestas Wind Systems | 125% |
| Spæncom A | 100% |
| Mols-Linien | 98% |

*Kelda: OMX Den Nordiske Børs A/S 01.01 – 27.12.2007*